# rth á Jóansøkufestivalin 2006


Den Danske Mafia


200


Land og synir


Maria Guttesen


Robert og vinmenn

all begins í 1994. Fyrr í vikuni koma so seinasta útgávan hjá Mariu, eina soloútgáva sum ber heitið: Maria Guttesen:LIVE. Og tað eru løg av hesari útgávu, sum vera at hoyra á Jóanssøkufestivalinum. Afturat sær hevur Maria Guttesen orðasmiðin Lene Dracmann, ið hevur skrivað flestu tekstirnar á nýggju fløguni.

Á nýggju fløguni fær lurtarin veruliga høvið at hoyra tónleikaligu evnini hjá Mariu, har hon sjálv syngur og spælir flygul, umframt at hon eisini sjálv hevur arrangerað og produserað fløguna.

Á Jóansssøkufestivalinum fáa áhoyrararnir høvið at uppliva henda føroyska tónleikaúrmælingin live, við einari vælupplagdari Petsi Tvørfoss sum kórsangarinnu.

## Rasmus Lyberth

■ Ein av heimskendu grøn-lendsku fólkasanga-rununum, Rasmus Lyberth verður at hoyra á Jóansøkufestivalinum. Rasmus Lyberth er kendur fyri sínar framúrskarandi framførslur av grønlendskum sangum, sum røkka heilt inn í sálina á áhoyrarunum. Rasmus er ikki minni kendur fyri sína persónliga skemtiliga hátt at leiða fólk gjøgnum framførslurnar.

Rasmus Lyberth hevur seinastu árini ferðast kring allan heim við sínum tónleiki. Saman við danamum Christian Søgård var Rasmus Lyberth m.a. á tourne í Suður Amerika fyrr í ár, og fara teir báðir eisini á pallin á Jóansøkufestivalinum

Seinastu árini er Rasmus Lyberth latin eina røð av viðurkenning, m.a. PH-prisen, Danish Jazz Beat and Folk Prize, og í sept. 2003 fekk hann eisini heiðursviðurkenningina, Foreningen Nordens Hæderspris.

## 200

■ Føroya størsti punk/rokk bólkur 200 fer á pallin á Jóansøkufestivalinum.

200 varð stovnað í 1996 í sambandi við fløguna "Rock í Føroyum 2". Eftir "Rock í Føroyum 2" hendi ikki so nógv, men 200 var tó við til Prix Føroyar í 2001, og tástani ljóðaði orkestrið, sum tað ger í dag. Elvisrøddin, politiska innihaldið og tónleikastílurin komu upp á pláss um hetta mundið. Hetta árið varð Gimpurin eisini føddur.

Í 2001 gav 200 fyrstu fløguna út, 200%. Hóast fløgan varð totalt ignorerað av loftmiðlunum, fekk hon sera góð ummæli og varð at enda útseld. Í mars 2005 varð "Viva La Republica" upptikin og givin út. Hendan fløgan fekk enn betri ummæli enn hin fyrra, og lagið "Muscleman-blað" gjørdist nr. 1 á 15 teimum bestu í 8 vikur.

Tónleikurin hjá 200 snýr seg oftast um føroyskan politikk, og við argandi, speirekandi tekstum verða nógv evni lýst á ein øðrvísi hátt. Hjá 200 er tónleikurin sostatt eitt amboð til at siga teirra hugsan. Sum 200 sjálvir siga, "Nógv ting í Føroyum eru langt úti, og onkur má siga tað ..."

200 standa altíð fyri framúrskarandi LIVE-framførslum, óhugsandi er, at Jóansøkufestivalurin 2006 verður eitt undantak.

200 eru: Niels Arge Galán, gittar og sang Mikael Blak, bass Uni Árting, trummur

## Robert og Vinmenn

■ Tað eru í ár 45 ár síðan alt byrjaði úti í gomlu Losjuni vestanfyri Galtnaroyri í Vági. Nú 45 ár seinni er pallurin størri, útgerðin betri og meiri fjøltáttað og talan verður um eitt tað størsta tiltakið í Suðuroy nakrantíð. Jú, Robert McBirnie fer saman við vinmonnum á pallin á Jóansøkufestivalinum.

Fyri 45 árum síðani byrjaði tað við "Red Boys", sum varð mannað av Tummas J. Midjord sáli aftan fyri trummuna - Jonhard við maracas (ranglum) - og Jákup Mortensen og Robert McBirnie við guitarum. Tað einasta, ið var elektriskt, var guitarin hjá Jákupi, sum brúkti eitt radio til forsterkara og so ein mikrofon, sum gekk ígjøgnum ein band-upptakaran.

Hatta var sum sagt byrjanin fyri 45 árum síðani. - Tey fylgjand mongu árini hevur Robert McBirnie so spælt í mongum samanhangum. - Í 1960unum við Faroe Boys og Islanders, í 1970unum við Jógvan Dahl, Jákup Thomsen og Ólavi Magnussen, í 1980unum kom orkestrið at eita Robert og Vinmenn, og tað navnið hevur tað tann dag í dag.

Manningin, sum verður saman við Robert á Jóansøkufestivalinum er heldur ikki ókend. Jógvan Dahl og Robert kennast sum sagt heilt frá Faroe Boys tíðini. Kolbein Simonsen og Robert hava spælt saman í óteljandi ár, meðan teir yngru, Finnur Hansen og Torkil Johannesen hava spælt saman við Robert í minst 15 ár. Og sum Robert sigur, fundamentið skuldi verið í lagið og vit gleða okkum at spæla rock´n roll , so tað slær aftur úr Skarðgjógv!

Robert og Vinmenn eru: Robert McBirnie, sang Jógvan Dahl, guitar og sang Kolbein Simonsen, bass Finnur Hansen, tangentar Torkil Johannesen, trum-mur

## Brandur Enni

■ Í 2002 tók Brandur Enni flest allar føroyingar á bóli, tá hann kom út á marknaðin við fløguni Waiting In The Moonlight. Eftir hetta gjørdi Brandur nøkur løg – eitt tað kendasta er helst The Way I Am. Brandur hevur somuleiðis sungið duett - Still Friends - saman við íslendsku songkvinnuni Jóhonnu Guðrún og framført á fleiri festivalum í Danmark – eitt nú í Jelling og Nibe. Og verður Brandur so eisini á Jóansøkufestivalinum við orkestrinum Anytime. Brandur hevur seinastu tvey árini arbeitt miðvíst við at skriva nýggjar sangir og hevur hann í hesum sambandi verið í Svøríki, har hann sama við teimum heimskendum tónleikarum hevur skrivað sangir. Á Jóansøkufestivalinum verða teir nýggju sangirnir eisini at hoyra. Anytime eru: Brandur Enni, sang o.a. Leivur Samuelsenm, trummur Bárður Poulsen, bass Sveinur Dam, el-gittar Heini Ragnarson, trompet Jákup Wardum, klaver

## Hanus G. Johansen

■ Ein hin kendasti før-oyski sangarin og tóna-smiðurin, Hanus G. Johansen kemur at spæla á Jóansøkufestivalinum. Hanus hevur seinastu árini havt óteljandi framúrskarandi og bergtakandi framførslur, sum hava drigið til sín ein stóran skara av áskoðarum. Við sínum tulkingum av yrkingum hjá Poul F. hevur Hanus sungið seg inn í hjørtuni á ungum og gomlum, bæði í Føroyum og uttanlands. – Og perlum sum Blóma mín, 18, Saknur, og óteljandi øðrum hevur hann laga varðar eftir seg, sum mong leggja leiðina framvið.

## Forgery

■ Forgery er ein rokkbólkur av Tvøroyri, ið var stovnaður í 2006. Manningin í Forgery er annars kend frá dansibólkinum Pikatchu, sum hevur verið einasti ungdómsbólkur í Suðuroynni í langa tíð.

Bólkurin sigur um seg sjálvan: Vit halda sjálvur, at okkara tónleikur er sermerktur. Tað kemur av tí orsøk, at allir í bólkinum hava ymsan dám fyri tónleiki. Tað hevur eisini víst seg, at vera tað skapandi evni í okkum. Vit hava eisini eitt sera gott umhvørvið innanhýsis í bólkinum og tað hevur skapað eitt sera flótandi samanspæl.

Forgery hevur síðan ársbyrjan arbeitt mið-víst framímóti eini frumframførslu á Jóan-søkufestivalinum.

Forgery eru: Jens Arni Leo – Sang. Frits Mortensen – Gittara og Back-up Sang Cem á Hólum – Trummur Elvis Leo – Gittara Rói Einarsson – Bass

## Dikta

■ Spennandi Íslendski rokk-popp bólkurin Dikta kemur á Jóansøkufestivalin. Dikta er seinasta árið vorðið ein tann best umtókti bólkurin í Íslandi. Við sínum annarleiðis popp sangum, sum eru kryddaðir við rokki, soul, funk og effektum, bjóðar Dikta eina óvanliga spennandi framførslu.

Seinasta fløgan hjá Dikta, Hunting for happiness, hevur fingið sera góð ummælið. Og hevur eisini verið søluvøran hjá bólkinum, sum í alt summar er á tourne í Evropa, har leiðin eisini gongur á Roskilde Festivalin.

Ein ummælari skrivar: While barely in their 20's, they have just completed their 2nd full length, Hunting For Happiness, which happens to be on of the greatest albums I've ever heard. Melting angular guitars, proggish rhythm, melancholy piano strokes, and unforgettable use of the delays, this forms an almost instant classic. Dikta eru: Haukur – Sang, gittara, keyboard Skuli – bass. Nonni – Trummur. Jon B. – Gittara

## The Dreams

■ Punk bólkurin The Dreams kemur aftur í ár á Jóansøkufestivalin. Í fjør høvdu The Dreams eina framúr góða framførslu á Jóansøkufestivalinum. Í ár eru punk trio'in fløguaktuell við fløgu, sum kemur út fríggjadagin.

Hetta er fyrsta fløgan hjá bólkinum, har bólkurin punkar føroyska sangskattin Á fløguni eru 10 løg, Hettar eru løg sum Til allar vinir hjá Blátt, 80'ini hjá Frændum, Sirkús Tinganes hjá Annfinn & Co., Sasa sa sa hjá Georg eystan Á, Forelskaður sjónleikari hjá Páll Finnur Páll, Eg siti so eina hjá Vestmonnum, Nú ert tú ein onnur hjá Eyðun Nolsøe av fløguni Eyðun og Terji. og Nummar hjá Terja Rasmussen. Teir tolka eisini Nalju klassikaran "Sjeikurin", ið Poppkorn eisini tolkaðu herfyri.

Sí eisini http://www.the-dreams.com/

## India

■ Bólkurin India úr Gøtu varð stovnaður í fjør, men er mannaður av royndum og góðum tónleikarum. Við í bólkinum eru Rói Johannesen, sang/gittar, Bergmann Finsson, gittar, Einar Jacobsen, sang/bass, Bárur Thomsen, trummur. Bergmann og Einar kenna mong frá bólkinum Wolfgang, í var ein av feitastu rock bólkunum sum hava verið í Føroyum. Nú hava vit sligið okkum saman og gjørt tónleik, í minnir um new rock schangruna. Sí eisini http://myspace.com/joinindia

## Eyðun og Neil

■ Fyrst kendir hvør í sínum lag og síðani saman. Felagsnevnarin var í byrjanini Guðrun Sólja, sum er systir Eyðun og sum Neil spældi nógv saman við. Síðani funnu Eyðun og Neil saman í eina duo, sum nú er ein hin virknasta og sum í Havn er at hoyra heilt nógv, men eisini t.d. hjá Thomsen á Tvøroyri. Ummælarar hava nevnt teir báðar festligastu duo í landinum. Umframt at vera festligir, so eru teir dugnaligir. Eyðun, við klárari og høgari rødd hóskar væl saman við guitarsnillinginum Neil.

Teir báðir fara at leika á bryggjuøkinum nakað undan sjálvari festivalbyrjanini leygar-dagin.

## Angela og Hannibal

■ Børnini verða ikki gloymd og partur av jóansøkuni og jóansøkufestivalskránni er eisini, at Angela og Hannibal fara at undirhalda. Hetta hendir á bryggjuøkinum leygardagin, nakað áðrenn Jóansøkufestivalurin byrjar leygardagin á Eiðinum.

Angela og Hannibal hava í fleiri ár verið tey, ið føroysk børn í øllum aldri hava verið hugtikin av. Nú er nakað síðani tey vóru at síggja á palli, men tey hava gjørt av at vitja Jóansøkufestivalin og at gleða børnini, sum vitja á bryggjuøkinum í Vági leygardagin.